# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fólkakirkjan og sóknarbørn í náðarloysi

Tað vóru áhugaverdir spurningar, sum Elin Winther Poulsen, útvarpskvinna, setti nýggja prestinum í Tórshavnar vestara prestagjaldi, Derhardi Olsen, leygarkvøldið.

Vit skulu nýta høvið á hesum stað at ynskja nýggja prestinum tillukku við kallinum og ynskja honum alt tað besta. Men tað sum prestur segði við útvarpið hetta kvøldið, fær okkum at seta hini føroysku Fólkakirkjuni nakrar spurningar.

Útvarpskvinnan spurdi prest, hvat slag av presti, hann er – og hann svarar, at hann er ein konservativur prestur, sum er fyri kvinnuligum prestum, men sum ikki vil gifta fólk, sum eru fráskild. Hann segði, at í summum førum er hjúnaskilnaður neyðugur, hóast hann er ímóti at fólk skiljast.

Tað er ein ørkymlandi støða, at fleiri prestar í Føroyum ikki vilja uppafturgifta fráskild fólk. Samfelagið loyvir hjúnaskilnaði, Fólkakirkjan loyvir eisini hjúnaskilnaði – Fólkakirkjan góðtekur, at prestar skiljast frá hjúnafelaga sínum og giftast uppaftur. Vit hava prestar, sum eiga børn uttan at verða giftir, og vit hava havt próst, sum er skildur og uppafturgiftur. Tí mugu vit spyrja, um hetta er nýggja linjan hjá føroysku Fólkakirkjuni, hvørs ovasta leiðsla er mannað av nýggjum, sum nýggi presturin í Havn umboðar?

Tað kann ikki vera rætt, at hvør prestur í sínum lag skal gera av, hvørji sóknarbørn eru góð nokk. Tað kann als ikki góðtakast, at summi sóknarbørn mugu leita sær í aðra kirkjusókn at leita sær náði, tí teirra egni prestur »er ein konservativur prestur«.

Tað er fólksins kirkju, vit tosa um. Eitt er, hvat fólk gera í privatum samkomum – men í Fólkakirkjuni skulu øll hava sama rætt - so frægt av skili má vera. Kann ein maður sum prestur ikki gera sína skyldu sum prestur saman við einum kvinnuligum presti, jamen so hoyrir hann ikki heima í kirkjuni anno 2010. Kann ein prestur ikki uppafturgifta fráskild fólk, so er støðan tann sama. Ella má Fólkakirkjan gera upp við seg sjálva, hvat hon vil.

Ovasta leiðsla fólkakirkjunnar eigur at traðka í karakter og greitt boða frá, at øll sóknarbørn skulu hava somu viðferð.

**Sosialurin**

## Amerikumenn og Nato guldu vælferðarpeningin

DAGFINNUR DANBJØRG



**– fyri at kunna nýta Føroyar og føroyingar í frontlinjuni í kalda krígnum**

Í síðstu viku bað ein høgrasinnaður sambandsjavnaðarmaður um at fáa Søguna - við stóra S - um, hvussu vælferðarsamfelagið Føroyar varð borðið í heim, og tá eg - av góðum grundum - undir gitingi og føðingini hevði høvi at fylgja við fedranna tosi og ætlanum, so haldi eg meg liggja inni við einari serligari søguligari vitan, sum bleiv til á fyrstu parket, har 1.-honds vitnini høvdu orðið og søgdu frá tí, ið annars ikki kundi sigast alment, tí ikki var hildið, at fólkið sum heild var búgvið at skilja og/ella góðtaka ætlaninar, ið smíðaðar vóru saman við fyrst og fremst USA og NATO, men eisini við donsku stjórnuni sum millumleikara.

Søgan er hendan: Eftir 2. heimsbardaga var m.a. Vestureuropa sera illa fyri. Mong sóu upp til kommunistarnar, sum høvdu ofrað seg í stríðnum móti nazistunum, og kommunisman hevði góð vakstrarlíkindi. Fyri at steðga hesum politiska rákinum til vinstru, har Vestureuropeisk lond kundu fingið kommunistiskar stjórnir, settu amerikanarar eina fíggjarliga risaætlan í verk, sum varð kallað Marshallætlanin. Vestureuropa fekk øgiligar peningaupphæddir, so hjólini aftur kundu fara at mala.

Danmark fekk sítt. Og føroyski parturin - av Danmarks parti - var uml. 10 mill. kr., sum í dag í okkara peningi hevði verið nógvar hundrað mill. kr. Men tað áhugaverda við tí føroyska partinum var, at við honum fylgdi boð um m.a. at útbyggja elveitingina og byggja Oyggjarvegin. Men hví tað? Jú, tí longu tá vóru ætlaninar um Føroyar í frontlinjuni í stoypiskeiðini. Allir partar vistu, at føroyingar vóru kendir sum eitt friðarelskandi fólk, sum høvdu mist ógvuligar nógvar pápar, menn og brøður av krígs ávum, og at fjøldin tí undir ongum umstøðum vildi krøkjast upp í nakran krígsførandi part yvirhøvur. Tí mátti ætlaninar haldast loyniligar.

Amerikumenn hildu eisini eyga við føroyingunum, at teir hildu seg á røttum politiskum vegum. Í tí sambandi hildu teir, at neyðugt var at halda eitt eyka vakið eyga við Erlendi, sum var útspioneraður bæði um telefonina, men eisini soleiðis at persónar fylgdu við í hansara aktivitetum, men mær vitandi, var tað til fánýtis, tí Erlendur opinbart bert gjørdi fult lógligt virksemi. Í hesum sambandi kann kanska vera áhugavert at nevna, at eg saman við føroyskum skúlabørnum var og vitjaði kring um í Danmørk í 1957. Tá vit vóru á dansk-týska markinum, segði annar ferðaleiðarin/ungur føroyskur lærari við meg - í tí hann peikaði á eitt bóndagarðslíknandi hús einar 300 m inni týsku megin - í hasum húsinum sigst Erlendur at hava tikið ímóti nógvum rublum fyri tænastur, hann hevur gjørt fyri russar.

Fyri at byrgja upp fyri kommunistaávirkanini frá Erlendi og hansara líkum - kanska serliga um teir funnu út av loyniætlanini hjá amerikumonnum/Nato um eitt eyga á Sornfelli - so kravdu amerikumenn, at danir settu í gongd vælferðarprojektir, sum NATO- londini skuldu fíggja á tann hátt, at danir løgdu peningin út og stóðu fyri detailjunum, og síðani skuldu danir fáa útreiðslurnar heilt ella partvíst refunderaðar við tilsvarandi bíligari NATO-limaskapi.

Karl Nolsøe hevur kannað útreiðslurnar til NATO og hevur skjalprógvað, at danir hava fingið refunderað føroysku vælferðarprojektini.

Við øðrum orðum vóru lív okkara, land okkara, okkara heilsa og øll okkara kæru sett í veð uttan at vit vórðu vitandi ella spurd. Vit hava fingið fíggjarligar samsýningar afturfyri. Nakrir føroyskir politikarar vóru alla tíðina vitandi um loyndardómin. Nakrir av teimum lugu fyri fólkinum ferð eftir ferð. Vit sluppu væl, tí fyrst í 60'unum kundu vit betalt tað stóru rokningina, sum hevði gjørt blokk og annars alt tað, ið hevur hingið og hongur uppi í honum til peanuts. Vónandi fellur Føroya søga einaferð rættan dóm, so vit kunnu seta kós, á tann hátt sum vit veruliga ynskja og vilja og ikki eftir loynidómum við skjúldum dagskráum milum myrkamenn úti og heima.

## Norðurlendska journalistfelagið stuðlar starvsfólkum í Kringvarpinum

**NJF stöder Føroysk Miðlafólk i kampen för oavhängig nyhetsjournalism i KvF.**

Det Nordiska Journalistförbundet NJF är bekymrad för utvecklingen i *Kringvarp Føroya*, där nyhetschefen är sparket och nyhetsavdelningen nedprioriterad.

NJF och dess medlemsförbund i Danmark, Finland, Färöarna, Island, Norge och Sverige, som representerar 60.000 professionella journalister i Norden ger all stöd till Färöarnas Journalistförbund *Føroysk Miðlafólk* i den principiella kampen mot nedprioriteringen av den oavhängiga journalismen i Färöarnas största arbetsplats för Journalister. Detta är en viktig kamp för oavhängig kvalitetsjournalism och nyhetsarbete överallt, och speciellt i public service –området.

Vi kallar KvF-ledelsen fram till dialog med FM och andra relevanta fackföreningar med ändamål att lösa saken med nyhetschefen och den allvarliga situationen på nyhetsavdelningen.

*Arto Nieminen*
President

*Juha Rekola*
Generalsekreterare

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.